

# Ukraina vísir skjøl

Nú kunnu fólk í Ukraina fáa at vita, um myndugleikarnir í gamla Sovjetsamveldinum hildu eyga við teimum. Ukrainska fregnartænastan hevur gjørt av at geva almenninginum atgongd til ein hóp av skjølum, sum higartil hava verið loybilig. Skjølini eru løgd í ein eina talgilda skipan, og tey kunnu lesast á 26 miðstøðum kring landið. Vladimir Viatrovych, sum hevur samskipað skjalatilfarið, sigur við spanska blaðið El Pais, at savnið er eitt Mekka hjá granskarum og øðrum, sum hava áhuga í søgu Sovjetsamveldisins.





*Lítli Leif leyp um hálsin á pápa sínum*




*Gott var at fáa pápan og mannin heim til jóla*




*skimannafelag
monnunum av
Skálabergi*



# Hanus til Russlands

Um vikuskiftið komu 26 mans av Skálabergi til Føroya, so enn eru 12 mans eftir í Russlandi. Hesir fáa nú vitjan av reiðaranum, Hanusi Hansen.

Sosialurin tosaði í morgun við Hanus Hansen, sum sat í einum flogfarið.

– Eg veit onki meira beint nú. Eg havi ikki tíð at tosa. Eg siti í einum flogfari, segði Hanus Hansen.

Ert tú á veg til Russlands?

– Møguliga. Eg kann bara siga, at rættarfundur verður hósdagin, segði Hanus Hansen og bað farvæl, meðan flogfarið hvein.

**-eij**